# Roknskaparfulltrúi

**Til roknskapardeild kommununnar verður søkt eftir fulltrúa.**

**Høvuðsuppgávur**

Nakrar av høvuðsuppgávunum hjá fulltrúanum eru:

* saman við roknskaparleiðaranum at skipa fyri dagliga bókhaldsarbeiðinum og at tryggja, at hetta verður røkt til fulnar
* at lýsa og menna arbeiðsgongdir á økinum, soleiðis at hesar verða so smidligar sum gjørligt
* at menna nýtsluna av edv-skipanunum sum arbeiðs- og leiðsluamboð
* at vera við í arbeiðinum at gera fíggjarætlanir, ávegis roknskapir og ársroknskapir o.a.
* at hjálpa stovnum og deildum við nýtslueftirliti, fíggjarætlanum og roknskapum
* taka lut í dagligum bókhaldsuppgávum

**Førleikakrøv**

Umsøkjari skal hava góð leiðslu- og samstarvsevni vera fyrikomandi og kunna arbeiða sjálvstøðugt. Fyrimun hevur umsøkjari við hægri útbúgving og arbeiðsroyndum innan roknskap. Góður kunnleiki til og arbeiðsroyndir við Navision Financial og Excel er ein fyrimunur.

**Býráðið bjóðar**

eitt áhugavert starv við fjølbroyttum og mennandi uppgávum.

**Setunarviðurskifti**

Starvið verður lønt sambært sáttmálanum millum TKST og Tórshavnar kommunu.

**Meira fæst at vita**

um starvið við at venda sær til Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, ella Hera Olsen, roknskaparleiðara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**

saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 2. mars 2000.

Roknskapardeildin hevur bókhaldið og roknskapin hjá øllum stovnum og deildum hjá kommununi um hendi. Í løtuni starvast 7 fólk á deildini.

# Psykologur

**Til sosialu deild, sum er ein partur av trivnaðarfyrisitingini hjá Tórshavnar kommunu, verður søkt eftir psykologi.**

**Arbeiðið**

Psykologurin skal virka sum ráðgevi og supervisor í barnaverndarmálum og í ávísan mun hava viðtalur við viðskiftafólk. Harumframt skal hann virka sum ráðgevi og supervisor hjá málsviðgerðunum og hjá leiðsluni í almennum spurningum innan fakøkið, herundir viðvíkjandi samskipan og samstarv við aðrar myndugleikar og stovnar.

Vit vænta, at viðkomandi kann arbeiða sjálvstøðugt og vera við í ráðlegging og samskipan av uppgávunum.

**Førleikakrøv**

Umsøkjarin skal vera útbúgvin sum psykologur. Autorisatión og royndir frá líknandi starvi er ein fyrimunur.

**Setunarviðurskifti**

Treytað av landstýrissins góðkenning verður starvið sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmálanum millum fíggjarmálastýrið og Magistarafelag Føroya.

**Meira fæst at vita**

við at venda sær til Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðara, ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, telefon 315160.

**Umsókn**

saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu sendast til Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn. Umsóknarfreistin er longd til 28. februar 2000, kl. 12:00. Merk á umsóknina "Psykologur".



Tórshavnar kommuna

## Søkt verður eftir
# TEKNISKUM LEIÐARA
## til Skipasmiðjuna á Skála

**Starvið:**

Sum tekniskur leiðari fær tú ábyrgdina av øllum tekniskum spurningum á Skipasmiðjuni. Tekniski leiðarin verður partur av leiðslu felagsins við beinleiðis tilvísing til stjóran. Tekniski leiðarin skal vera við til at menna virkið tekniskt, somuleiðis sum hann skal viðvirka til at styrkja verandi virksemi og finna nýggjar møguleikar fyri øktum virksemi. Arbeiðsplássið er á Skála.

**Høvuðsuppgávur:**

- at vera tekniskt tengjulið millum virkið, viðskiftafólk og myndugleikar
- at vera við til at leggja ætlanir fyri arbeiði og menning av virkinum
- at vera við til at mynda leiðsluna á virkinum bæði dagliga og við framtíðini í huga
- at vera formonnum og starvsfólki annars til hjálpar í tekniskum spurningum
- at leiða tilboðsrokning og gera metingar av arbeiðum sum heild, bæði fíggjarliga og hvat viðvíkur tíð

**Førleikar:**

Vit rokna við at tú:

- er maskinverkfrøðingur og/ella hevur víðkað maskinmeistaraprógv
- hevur góð samskiftis- og samstarvsevnir
- hevur evnir at greina tekniskar trupulleikar, viðgera møguleikar til loysnir og ert før/ur fyri at taka avgerðir
- dugir væl at málbera teg á føroyskum, skandinaviskum og enskum máli, bæði skrivliga og munnliga

**Vit bjóða:**

Eitt sjálvstøðugt arbeiði við góðum møguleikum fyri persónligari menning. Løn, trygging og eftirløn eftir nærri avtalu partanna millum.

Um hetta hevur tín áhuga ella um tú hevur spurningar hesum viðvíkjandi, vinarliga set teg í samband við okkum á tlf. 441155.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

**Skipasmiðjuna á Skála**
att.: Jón Danielsen
FO-480 Skála

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og freistin at lata inn er 10. mars 2000.

SKIPASMIÐJAN
Á SKÁLA
**www.faroeyard.fo**
**skala@faroeyard.fo**

P/f Skipasmiðjan á Skála er dóttirfelag hjá P/f Tórshavnar Skipasmiðju. 75 fólk starvast á Skipasmiðjuni, sum í løtuni hevur sáttmála við Føroya Landsstýri um nýggja Sandoyarferju, ið skal latast um ársskiftið.


# Krosstein

Pf. Svend




Góðkendir rottangar

Falkavegur 6 - FO 110 Tórshavn
Tel. 314600 - Fax 314601
Teldupostur: sk@post.olivant.fo

Sosialurin - 311820


## Skrivari søkist

FFS søkir skrivara 4 tímar um vikuna. Løn eftir avtalu.

Umsókn verður at senda til

**Føroya Fimleikasamband**
Postboks 223
FO-110 Tórshavn

## Frá Norðoya Javnaðarfelag

Limafundur og 1. uppstillingarfundur til býráðsval verður í Bøgøtu nr. 3

**mánakvøldið tann 28. feb. 2000 kl. 19.30.**

Vilhelm Johannesen, Hendrik Old og Jóannes Ejdesgaard luttaka.

**Norðoya Javnaðarfelag**

Lýsið í sosialinum




**VEGG SAGING**
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

**HOL SAGING**
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

**GÓLV FRESING**

**GÓLV SLÍPING**

**GÓLV SAGING**
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

**FØROYA BETONG SAGING** v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820

**MÁLNINGAFRAMSÝNING Í SMIÐJUNI Í LÍTLUVÍK**
**1/3 til og við 6/3 2000**

**Opið er:**
Mikudag til fríggjadag kl. 15.00-19.00
Leygardag ........................ kl. 14.00-20.00
Sunnudag ......................... kl. 14.00-18.00

**Pauli Vang**

Sosialurin - 311820

# FASTALÁVINT

**Í 3'ARANUM fáa tit steypið tit skulu nýta til KATTAKONGIN 2000.**

*Kom inn til okkara og síggj okkara stóra úrval innan steyp og heiðursmerkir*



3arin
SMS
Tel. 31 98 20 - 31 06 06
Fax 31 49 55
E-mail: tryarin@post.olivant.fo

Sosialurin - 311820

ALT INNAN TIMBUR- OG SNIKKARAARBEIÐI

Gerið avtalur við okkum í góðari tíð til summarið

**Nýtt tel. 21 43 21**

Snikkarameistari
**RÓI DAHL-JACOBSEN**

**Trygdarútgerð til øll endamál!**

- Verndarhjálmar og húgvur
- Hoyrivernd v/FM radio
- Brillur
- Maskur
- Trygdarskógvar
- Fallsikringar
- Handskar
- Hondreins
- Vit útvega skiltir til øll endamál!

Vit taka okkum av øllum uppgávum innan arbeiðaravernd

Tosið við okkum!

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

**Lesið sosialin**



GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR.
NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

**Til útisetar í Danmark**
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað



**Danstein**
Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

Skjót levering

Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961

RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN www.danstein.fo

*Fosroc A/S er ein partur av Burmah- Castrol Gruppens byggikemisku deild, sum við høvuðsskrivstovu í Englandi arbeiðir undir navninum Fosroc í fleiri enn 60 londum. Burmah-Castrol Gruppen hevur uml. 22.000 starvsfólk og selur fyri uml. 30 mia. árliga.*

*Fosroc A/S hevur uml. 40 starvsfólk í arbeiði og hevur høvuðsskrivstovu og virki í Skodborg sunnanfyri Vejen, har ein partur av vørunum hjá okkum verða framleiddar. Fosroc A/S hevur harumframt ábyrgdina av marknaðarførslu og sølu av vørum til norðurlond.*

*www.fosroc.dk*



*FOSROC A/S heldur fram við víðkan av tí norðurlendska marknaðinum og hevur frá 1. jan. 2000 sett Kristian Eldevig í starv sum høvuðsráðgeva við ábyrgd fyri viðlíkahaldi og víðkan av núverandi og nýggjum kundasamskifti í Føroyum og í Danmark.*

*Kristian Eldevig er byggifrøðingur og kemur úr einum líknandi starvi sum leiðari fyri verkætlanum í Skanska Jensen A/S.*

*Handilsøki er serliga innan betongumvæling, sement- og kunstevnisgrundaðar ídnaðarbelegningar í sambandi við nýbygging umframt umvælingar- og viðlíkahaldsuppgávur.*

*Tygum eru vælkomin at seta tygum í samband við Kristian Eldevig, Fosroc A/S, Industriparken 27, Skodsborg, 6630 Rødding, Tel. 74848884, Fax 76830115 ella fartel. 40341981. E-mail: kristian_eldevig@burmahcastrol.colm*

Sosialurin - 311820


# GRAMEX

## Útgjald úr Gramex-grunninum



Heit verður á øll, ið framleiða føroyskar plátur, bond og ljómfløgur, um at senda skjalprógvað tilfar um, hvussu nógvar eindir av LP/MC/CD hvør einstakur framleiðari ella virki hevur framleitt í tíðarskeiðnum 01.04.99 til 31.12.99.

Upplýsingarnar kunnu vera váttan frá veitaranum um, hvussu nógvar eindir av hvørjum verki eru gjørdar. Avrit av fakturum yvir eindirnar kunnu eisini góðtakast.

Eru ivamál hesum viðvíkjandi, Kunnu tit ringja til:
Kristian Blak, Tutl
Tel. 31 48 15, fax 31 48 25
Gissur Patursson, 3-arin
Tel. 31 98 20, fax 31 49 55
Hans Pauli Torgarð, H.C.W
Tel. 31 45 04, fax 31 89 43

Mannagongdin er síðani, at allar eindirnar verða taldar saman í stigum, ið so verða nýtt, tá samlaða upphæddin frá GRAMEX skal býtast.

Sjálv útgjaldingin verður í mars 2000.

Alt tilfar skal sendast til:

Framleiðslufelagið • Postboks 1057 • FO-110 Tórshavn



**Minnist til hesar váttanir:**

1. Váttan frá grannskoðara um framleiddar eindir
2. Avrit av faktura
3. Váttan frá studio um tal av eindum ella tvítøkum

Seinasta freist fyri innlating er 1. mars 2000